SANDAVÁGS KOMMUNA

## KOMMUNUVAL

**Valstýrið í Sandavágs kommunu boðar hervið frá, at VAL til kommunustýrið í VÁGA KOMMUNU verður týsdagin 11. novembur 2008.**

Í Vága kommunu skal ein valevnislisti hava í mesta lagi 15 valevni.
Valevnini skulu vera skilliga lýst við navni, starvi, føðingardegi og bústaði.

Listin skal vera undirskrivaður av í minsta lagi 15 og í mesta lagi 25 veljarum sum stillarum. Hjálagdur skal vera ein serligur listi yvir stillarar, hvar teir eru skilliga lýstir við navni, starvi, bústaði og føðingardegi.

Ein persónur kann bert vera stillari á einum lista.

**Valevnislistar kunnu latast inn til kommunuskrivstovuna ella formannin í valstýrinum í seinasta lagi týsdagin 21. oktobur klokkan 1800.**

**Fyri valstýrið**
*Gutti Petersen, form.*

## Campingvognur

Adria Adiva 502 UP við nógvari útgerð frá juni 2006 **til sølu fyri 95000.-**

Nýtt fortelt er til vognin.
Vognurin er sum nýggjur.

*teldupost : kvilt@post.olivant.fo*

KIOSK ACTIV

## Starvsfólk søkist

Søkt verður eftir fólki til at arbeiða kvøldvaktir og dagvaktir í Kiosk Activ.

**Nærri fæst at vit við at ringja á tlf. 73 37 41**

Veðrið · Bilar · Lýsingar · Tíðindi · Viðmerkingar · Ítróttur · Nøvn · Skráir · Tiltøk

## Hjálparfólk

Vistarheimið á Fugloyarvegi 1 í Tórshavn, søkir eftir hjálparfólki til náttarvakt at byrja 1. desembur 2008 ella skjótast gjørligt. Náttarvakt er frá kl. 23.00 til 8.00. Náttarvaktin kann vanliga sova frá umleið midnátt til kl. 7, tá farið verður upp við búfólkunum.

Vistarheimið søkir somuleiðis eftir hjálparfólki til farloyvisstarv í tíðarskeiðnum **1. novembur 2008 til 31. oktobur 2009**. Starvið er dagvaktarstarv frá kl. 8.00 til 16.00.

Allar vaktir eru skipaðar sum 7 dagar við arbeiði og 7 dagar frí.

Vistarheimið er bústovnur, sum hevur til endamáls at vera heim fyri heilsubrekað og sinnisveik.

Umráðandi er, at umsøkjarin hevur hug og lyndi at arbeiða við heilsubrekaðum og sinnisveikum, og evnar at fjálga um búfólkini.

Umsøkjarar við røktarfakligum útbúgvingum og royndum hava fyrimun.

Løn sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til dagliga leiðaran, Maluna av Reyni á tlf. 313381 ella 256773.

Umsóknir skulu vera Vistarheiminum í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 24. oktobur 2008.**

**Tórshavnar Privata Vistarheim**
Fugloyarvegur 1
100 Tórshavn

## Vallistin

Vallistin til skúlastýrisvalið 11. nov. liggur frammi á kommunuskrivstovuni frá **15. - 28. okt. 2008.**

Kærur um skeivleikar á listanum skulu sendast skúlastjóranum í seinasta lagi 1 viku fyri valdagin.

**Sjóvar kommuna**
Skúlavegur 10
490 Strendur

## ÍBÚÐ Í TÓRSHAVN

Eldri maður søkir íbúð í Tórshavn frá 1. februar

Eri friðarligur og fari væl um

**Ring á tlf. 22 00 22**

## KUNNGERÐ

Vísandi til kunngerð frá innlendismálaráðnum fer kommunuval fram

**týsdagin tann 11. november 2008.**

**Valið til Kvívíkar Bygdarráð fer fram:**

| | |
|---|---|
| **Fyri bygdirnar Skælingur,** | |
| **Leynar, Stykkið og Kvívík:** | í Kvívík skúla |
| **Fyri Válin:** | í Vála skúla. |

**Atkvøðutíðin er frá kl. 10.00 til kl. 20.00**

ella so leingi veljarar møta uttan steðg, og verður tá valið lýst liðugt.

**Brævatkvøður:**
Veljarar, sum verða burturstaddir valdagin ella á annan hátt lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Brævatkvøður skulu verða valnevndini í hendi innan valið byrjar **kl. 10.00 tann 11. november 2008.**

**Heimaval:**
Veljarar, sum vegna sjúku ella væntandi førleika, ikki kunnu møta við valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagi dagin fyri valið við at boða kommunuskrivstovuni frá, helst innan kl. 15.00, mánadagin 10. november 2008, á tlf. 42 12 94.

**Valkort:**
Valkort eru send út við postinum og um persónur, sum heldur seg hava valrætt í kommununi ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Mint verður á, at tygum eiga at hava valkortið við á val.

*Tann 14. oktober 2008*

**Valnevndin í Kvívík**
*Tummas Marni Joensen, form.*

## Kunngerð um vallistar í Hvalbiar sókn til kommunu- og skúlastýrisvalið 11. november 2008. T.v.s. Hvalba og Sandvík.

Til kommunu- og skúlastýrisvalið 11. november 2008 í Hvalbiar sókn eru vallistarnir til skjals á kommunuskrivstovuni frá 14. oktober til 28. oktober 2008.

Kommunuskrivstovan er opin millum kl.16.00 og 18.00 mánadag og tórsdag.

Kærur um skeivleikar á listunum skulu sendast til valnevndirnar í seinasta lagi 1 viku fyri valdagin.

*Hvalba 9.okt.2008.*

**Vegna valnevndinar fyri kommunu- og skúlastýrisvalið 2008.**
*Elberg Klettheyggj valnevndarformaður í Sandvík.*
*John Berg valnevndarformaður í Hvalba.*

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo